# Tað góða samfelagið og fíggjarlógin – 4. partur

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



## Hesaferð um heilsuverk og heilsuátøk

**Raðfesting av heilsuverki og heilsuátøkum**

| | |
|---|---|
| • Sjúkrahúsini, m.a. styrking av serlæknaøkjum | 3,7 mió. kr. |
| • Kommunulæknaskipanin, nýggja vaktarskipan | 1,2 - |
| • Talgild kunningarskipan í heilsuverkinum | 3,0 . - |
| • Heilsuátøk smb. Fólkaheilsuætlanini | 1,2 - |
| **Tils.** | **9,1 mió. kr.** |

Sjálvsagt er heilsuverkið eitt av teim økjunum, sum eisini er raðfest frammaliga í fíggjarlógaruppskotinum. Heilsuverkið fevnir her bæði um tað primera fyribyrgjandi heilsuverkið (sum kommunulæknar, heilsufrøðiskipan o.a.) og tað sekundera viðgerðandi heilsuverkið (sum er sjúkrahúsverkið).

Yvirlitið vísir uppraðfestingarnar á fíggjarlógaruppskotinum – tvs. tað sum er lagt aftrat omaná avsetingarnar til vanligan rakstur.

**1) Sjúkrahúsini**: Hesaferð verða settar 3,7 mió.kr. av til serligar uppraðfestingar á sjúkrahúsunum, m.a. við at styrkja heilsutænastuna á serlæknaøkjum.

Á Landssjúkrahúsinum er tað røntgentkanningarøkið í ár, og hildið verður fram í 2007 við at styrkja krabbameinsviðgerðina og neurologisku tænastuna við at serlæknar verða settir á hesum økjunum. Eisini skal dialysuviðgerðin styrkjast.

Á Suðuroyar Sjúkrahúsini skal í 2007 umsíðir setast ein medisinskur yvirlækni, eftir at læknamanningin í áravís bert hevur verið kirurgiskir yvirlæknar.

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er tað serliga KT-økið, sum verður raðfest.

**2)Kommunulæknavaktarskipan**: Í áravís hevur verið arbeitt fyri at fáa eina nýggja vaktarskipan á kommunulæknaøkjunum. Umsíðir er nú greitt, at ein nýggj skipan verður sett í verk í jan. 2007. Endamálið er at veita borgarunum eina betri og tryggari læknatænastu uttan fyri vanligu viðtalutíðirnar.

Samstundis er endamálið at skapa eitt nýtt og betri arbeiðsbýti millum kommunulæknarnar um eina vaktarbyrðu, sum er blivin alt meira tyngjandi og ein forðing fyri at fáa mannað kommunulæknastørvini við ungum læknum.

**3) Talgild heilsuskipan**: Seinastu tvey árini er gjørd ein stór íløga í at menna eina sonevnda talgilda heilsuskipan, ið er ein talgild ella elektronisk kunningarskipan við grundarlagi í eini felags elektroniskari sjúklingajournal bæði fyri sjúkrahúsini og fyri kommunulæknarnar

Endamálið er at betra um sjúklingatrygdina og betra um góðskuna av sjúklingaviðgerðini. Í komandi ári skal henda nýggja slóðbrótandi skipanin takast í nýtslu, og til raksturin verða settar 3 mió. kr. av í fíggjarlógaruppskotinum.

**4) Heilsuátøk sambært Fólkaheilsuætlanini**: Í vár varð Fólkaheilsuætlan Føroyinga løgd fyri løgtingið til aðalorðaskiftis, og var hon sera væl móttikin bæði har og í almenninginum. Í 2007 verða settar 1,2 mió. kr. av til serlig fólkaheilsuátøk á raðfestu økjunum, sum eru: 1) rørsla, 2) royking, 3) kostur, 4) rúsevnismisnýtsla, og 5) fyribyrgjandi heilsukanningar. Ætlanin er at Fyribyrgingarráðið skal standa fyri hesum heilsuátøkunum.

Onnur heilsupolitisk átøk eru:
- Uppbygging av barna- og ungdómspsykiatri í Føroyum.
- Styrking av fyribyrgjandi heilsutænastum fyri børn og ung.

Hesi mál eru longu umrødd í sambandi við familjupolitiska økið.

**Íløgur í heilsuverkið**: Heilsuøkið er eisini raðfest við stórum íløgum í 2007. Tað verður umrøtt í einum seinni greinastubba.

# Tú viðger ikki fólk líka við at viðgera tey eins

TURIÐ DEBES HENTZE



**Mannarættindasáttmálin**

Mannarættindasáttmálin, sum løgtingið hevur bundið seg til, áleggur politiska myndugleikanum at tryggja øllum borgarum landsins somu rættindi og at ansa eftir, at ikki summi vera hildin uttanfyri ella fáa bert avmarkaði rættindi.

Mannarættindasáttmálin er antidiskriminatiónslóggáva, sum umframt at siga, at øll eiga somu rættindi, eisini minnir á, at minnilutabólkarnar í samfelagnum skulu hava somu rættindi. Hesir mugu ikki gloymast. Og nevndir vera bólkar við eyðkennum um húðalit, religión, trúgv, kyn ella politisk sannføring.

Mannarættindasáttmálin leggur upp til, at nágreinilig national lóggáva verður gjørd samsvarandi hesum, tá tørvur er á hesum. Javstøðulógin er dømi um antidiskriminatiónslóggávu. Somuleiðis er reglan í revsulógini § 266 b dømi um slíka antidriskriminatiónslóggávu, tí hon nevnir ávísar minnilutabólkar sum krevja serliga verju – júst tí teir eru minnilutar í einum samfelag. Og tað er í hesi grein at tey samkyndu eisini eiga at vera nevnd:

**§ 266 b.** [34] Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse eller tro, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år.

**Eru øll líka fyri lógini?**

Í einum demokratiskum samfelag hevur reglan um, at øll skulu hava somu rættindi kanska minni praktiskan týdning. Ósemja tykist ikki vera um, at "øll skulu vera líka fyri lógini" uttan at tó nærri verður komið inn á, hvat liggur í hesum ofta popput brúkta útsagni. Vit eru jú ikki ein homogenur bólkur, og ofta vera serlig atlit tikin til ymiskar samfelagsbólkar. Nógvar serlógir eru gjørdar júst við hesum grundgevingum.

Hin reglan í mannarættindasáttmálanum, sum leggur áherðslu á at minnast til minnilutabólkarnar í lóggávuarbeiðinum, hevur hinvegin stóran týdning eisini í okkara demokratiskum samfelag, har meirilutin jú ræður. Meirilutin hugsar ofta mest ella hvussu er fyrst um seg sjálvan og hevur lyndi at gloyma minnilutarnar og tiga teir burtur – um teir loyva tí!

**Antidiskriminatións-lóggáva skal tryggja javstøðu**

Tá mannarættindasáttmálin áleggur okkum at gera lógirnar so, at minnilutabólkar fáa tryggjað rættindi teirra á jøvnum føti við meirilutan, so tosa vit ikki um at gera serlógir, sum skulu tryggja teimum samkyndu serlig rættindi framum onnur. Vit tosa um at gera reglur, sum skulu styrkja støðuna hjá minnilutunum so, at hesi fáa møguleikar at virka undir somu treytum sum onnur í samfelagnum. Tað veri seg í privatlívi, á arbeiðsmarknaðinum ella í tí almenna lívinum.

Á revsirættarliga økinum, skal serreglan um samkynd, tryggja, at ein ikki órevsað kann happa ein samkyndan júst tí at hann ella hon er samkynd – eins og galdandi er fyri happing vegna eitt nú húðalit.

Tey samkyndu fáa ikki betri sømdir enn meirilutin við hesi lóggávu, men tey fáa eina verju sum tey heteroseksuellu ikki hava fyri neyðini. Tey samkyndu vera happað fyri sín seksualitet, júst tí tey eru ein veikari minniluti í samfelagnum. Meirilutin, also tey heteroseksuellu, hava ikki verju mót seksuellari happing fyri neyðini, tí meirilutin verður ikki happaður orsakað av sínum seksualiteti – júst tí hann er ein meiriluti.

**Diskriminatión**

Diskriminatión merkir at gera mun á fólki, positivt ella negativt. Alt tos um neyðuga og serliga trygd til minnilutabólkar, krevur sjálvsagt eina viðurkenning av, at "øll eru ikki líka fyri lógini", at minnilutabólkar finnast, at tað er nakað sum eitur diskriminatión, og at diskriminatión er eitt vanligt fyribrigdi millum fólk og bólkar – ofta grundað á ymisk generel eyðkenni. Politikkarin sum ikki viðurkennir, at diskriminatión eksisterar og kennir ábyrgd á økinum, er eftir mínum tykki ikki uppgávu sína vaksin. Uppgávan er at røkja áhugamálini hjá øllum borgarum og lurta eftir hvat rørir seg í samfelagnum eisini á minnilutaøkjum.

**Religión ella rættartrygd**

Tað er rættiliga undrunarvert, at tað skal bera fólkavaldum politikkarum til við góðum smakki í munninum, kanska við religiøsum grundgevingum, at nokta at veita teimum samkyndu revsirættarligu verju á sama hátt sum øðrum minnilutabólkum. Og hetta samstundis sum vit í hesum døgum eru vitni til eyðmýkjandi leiklutin júst hesum bólki er við sýnda illviljanum. Eitt paradoks í sjálvum sær.

Er uppgávan ikki at veita borgarunum í landinum tað rættartrygd teimum tørvar. Eg dugi ikki at síggja, at hetta yvirhøvur hevur nakað við religiøsa sannføring at gera.

Tú viðger ikki fólk líka við at viðgera tey eins.

Opið bræv til Fútan og Løgtingið:

# Ja - til eisini at verja tey samkyndu!

**Tað er skelkandi at lesa í fjølmiðlunum, hvussu politi alment hevur valt ikki at verja ein ávísan samfelagsbólk!**

JOHN WILLIAM JOENSEN
Norðoya Sambandsfelag



Fyrst verður ein samkyndur álopin ella happaður á eini matstovu! Síðan verður viðkomandi forfylgdur! Nakrar dagar seinri verður sami persónur ringdur upp fleiri ferðir heima við hús av ókendum manni, sum hóttir samkynda mannin við lívinum!

Sambært fjølmiðlunum eru fleiri vitni, sum hoyra telefonsamrøðurnar!

Hetta er skelkandi og hoyrir ongastaðni heima.

Tað sum tó skelkar enn meira er, at varapolitiinspektørurin í fjølmiðlunum sigur, at politiið fær einki gjørt - tí persónurin, sum er miðpunktið fyri hesum ógvusliga áganginum, er samkyndur.

Tað má vera eitt krav, at tey samkyndu fáa somu verju sum onnur – og tí eigur fútin at gera greitt, at eisini tey samkyndu verða vard av politinum, tá tey verða hótt við lívinum, ella tá harðskapur verður framdur móti teimum.

Hóast vit kunnu vera ósamd um etiskar spurningar, so er eingin ivi um, at lógin eigur at verja allar borgarar í hesum landinum. Er neyðugt at tillaga lógina soleiðis, at allir samfelagsbólkur vera vardir, eigur tað at vera gjørt.

**Ikki samdur við Tjóðveldisflokkin og løgmann**

Hinvegin er eitt langt lop frá tí málinum, sum nú koyrir í miðlunum og so til uppskotið um skrásett parlag, sum Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt seg til talsmann fyri.

Teir bólkar í samfelagnum, sum nú eisini Føroya løgmaður tekur partí við, og sum m. a. stríðast fyri skrásettum parlagi, ætla meira enn hetta. Tey vilja eisini, at tey samkyndu skulu kunna giftast í kirkjum, og at tey samkyndu skulu kunna ættleiða børn.

Tað er hetta slagið av samfelag, sum undirritaði ikki vil hava, sjálvt um hetta er galdandi í ávísum býi í USA.

Vit leggja okkum sjálvandi ikki út í, hvussu danir og aðrir útlendingar skipa síni samfeløg, men vit vilja vera við til at avgera, hvussu føroyska samfelagið verður skipað, og júst tí hevur tað alstóran týdning, at føroysk lóggáva er grundað á føroyska mentan og siðalæru.